# Føroyskur Amagermeistari

**Tríggir føroyingar lógu alla kappingina í oddinum, og loksins varð Heini Olsen tann stinnasti tá hann ikki gjørdi mætari enn at vinna Amagermeistaraheitið**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Klaksvíkingurin Heini Olsen, sum seinastu mongu árini hevur havt bústað á Amager, má kenna seg heima á oyggjuni Amager. Úrslitini í Amagermeistaraheitinum hava nevnliga síðani 1999 fløskað seg rættiliga væl hjá honum, og í ár bardi Heini seg uppá sjálvan tindin. 50 telvarar luttóku.

Stríðið í toppinum var í fullum blóma innan seinasta umfar. Tveir danir lógu fremstir við fimm stigum av seks møguligum, meðan Heini Olsen, saman við eitt nú Carl Eli N. Samuelsen og fýra øðrum telvarum, hevði hálvtfimta stig. Eyðun Nolsøe og Arild Rimestad høvdu ávíkavist fýra og hálvtfjórða stig undan hesum veruliga finaluumfari.

Heini vann sítt talv móti øðrum oddamanninum (Finn Nøhr, sum telvar við Talvfelagnum Føroyar í ár), og tá hin oddamaðurin somuleiðis tapti endaði Heini saman við tveimum øðrum á fyrsta plássinum við 5,5 stigum. Heini hevði bestu mótstøðustig, og vann tí officielt Amagermeistaraheitið 2002.

Carl Eli hevði møguleika at enda ovastur, men javnleikurin móti 67 ára gamla veterananum Nils Nilsson rakk ikki longur til enn eitt fjórða pláss, hálvt stig aftanfyri vinnarnar. Eyðun fekk eins og Carl Eli fimm stig, tá hann vann á Miriam Olsen, meðan Arild endaði við hálvumfjórða stigi.

### Meting av føroysku avrikunum

Av føroyingunum skaraði Heini framúr. Ikki bert á stigatalvuni, men telvingin var bæði nærlagd og eitt vet tryggari enn hjá hinum landsmonnunum. Bert ein svipsari var hjá Heina, tá hann í sætta umfari tapti ímóti Peter Larsen (2280), men annars tykist fimmfaldaði føroyameistarin at vera í góðum formi, sum vit best kenna hann.

Hin klaksvíkingurin, Eyðun, var heldur svingandi í sínari telving. Hann legði út sum ein stormur við fýra stigum av fýra møguligum. Men í fimta og sætta umfari mátti hann lúta, móti eitt nú Heina, og tá varð ov seint at venda skútuni. Eyðun vann tó sjeynda umfar, og fekk fimm stig, sum var eitt petti undir væntaðu skoruna. Telving hansara varð merkt av góðum vinnaravilja (vann fimm, tapti tvey), og onkuntíð hendir tað at ein tá leypir nakað framav.

Greinskrivarin tapti einki talv, men vann hinvegin bert trý talv, og leikti heili fýra javnleikir. Telving hansara var kanska ov trygg, men eitt vet rætta vegin á føroyska ratinglistanum eftir kappingina ger, at hesin hóast alt er hampiliga nøgdur við avrikið. Arild snávaði í seinasta umfarinum móti lægri styrkismettum telvara. Innan hetta talv hevði Arild eina hampiliga kapping.

Alt í alt góð føroysk avrik, har tríggir av føroyingunum myndaðu toppin.

# Talvið hesa vikuna

**Havi í dag valt talvið hjá mær móti Miriam Olsen at seta í blaðið. Valið er fallið á hetta talv vegna undirhaldsvirðið. Ikki tí, feilir eru at finna hjá báðum pørtum, men undirhaldsvirðið er í øllum førum á hampiliga høgum støði, hóast telvingin kanska ikki er á sama støði.**

Miriam Olsen (1855) — Carl Eli N. Samuelsen (2127)
Amagermesterskabet (4), 17.09.2002

1.e4 c5 2.Rif3 e6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 a6 5.Bc4 (ivasamt) Rif6 6.Ric3 b5 7.Bd3 [7.Bb3 b4 8.Ria4 Rixe4 er gott fyri svartan í hesum frábrigdi] 7...Fc7 8.Fe2 d6 9.0-0 Bb7 10.f4 Ribd7 11.Kh1 Be7 12.Bd2 h5! (mótspæl er neyðugt, eftirsum hvítur hevur plan um at trýsta e5 fram) 13.g3? (sera ivasamt, eftir sum b7 bispurin vaknar. Men hinvegin er h4, h3 ringt at forða. 13. h3 er heldur ikki heilt gott vegna h4, Rih5) 13...Ric5 14.Rif3? b4 15.Rid1 Ricxe4 16.Bxb4 h4 17.g4



Rig3+! 18.hxg3 hxg3+ 19.Kg2 [19.Kg1 Fb6+ 20.Fe3 Fxb4 21.g5 Rih5 er somuleiðis vinnandi fyri svartan] 19...Rh2+ 20.Kxg3 Rxe2 21.Bxe2 Rie4+ 22.Kh3 Fxc2 23.Rid4 Rif2+ 24.Kg3 [24.Rxf2?? Fh7+ 25.Kg3 Fh4#] 24...Bh4+ (spæli eitt sindur við eld, men alskurin til hendan leik var ov stórur_) 25.Kxh4 Fh7+ 26.Kg3 Rih1+ 27.Rxh1 Fxh1 28.Bf3 (Rif3 er drúgvari, men Kd7 vinnur lættliga, tá rókurin kemur við í leikin) 28...Fg1+ 29.Kh3 Kd7 30.Be1 Rh8+ 31.Bh4 Rxh4+ 32.Kxh4 Fh2+ 33.Kg5 Fh6# 0-1

# FCK er aftur á meistarakós

**Teir tríggir kappingarneytarnir hjá Toda Jónsson gjørdu allir um seg, tá AGF varð sent til hús við 2–0 tapi**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Tað vóru teir tríggir, sum kappast um álopsplássini á FCK liðnum við Toda Jónsson, sum vórðu mest umrøddir, eftir at FCK sunnudagin vann 2–0 á AGF. Liðið úr Århus hevði ikki nógv at bjóða uppá í álopspartinum. Verjuspælið hjá FCK tykist nú aftur vera, sum tað var stórar partar av seinasta kappingarári. Eftir tveir 3–0 lúsingar í Aalborg og Esbjerg tykist FCK skútan at verða rættað væl uppaftur, og nú stevnir hon aftur ímóti meistaraskapinum, sum teir síðsta kappingarár mistu í evstu løtu.

Todi Jónsson var ikki millum teir fyrstu ellivu. Hann varð ikki skiftur inn, fyrrenn tað restaðu tríggir minuttir. Tá avloysti hann Peter Møller, sum kundi fara væl nøgdur undir brúsuna. Hann hevði skorað eitt mál, og tað er tað, sum hann fær løn fyri.

### Zuma í borðinum

Seinastu vikurnar hevur verið nógv tosað og skrivað um, at vongspælið hjá FCK hevur ikki verið nóg gott. Hesa ferð gjørdi venjarin eina nýggja roynd, og hon eydnaðist væl.

Liðformaðurin, Christian Lønstrup, var ikki tøkur. Hann plagar at vera ytstur á miðvøllinum í høgru. Hesa ferð var Zuma fyri fyrstu ferð nakrantíð í hesum plássinum á FCK liðnum. Zuma plagar annars at spæla í hesum plássinum, tá hann spælir á suðurafrikanska landsliðnum.

Royndin eydnaðist væl. Zuma var væl upplagdur, og hann var upphavi til bæði málini í 2–0 heimasigrinum. Bæði málini komu í løtuni kring steðgin. Í tí fyrra førinum kom kontra á, og Jörgen Pettersson fekk við knænum bóltin um strikuna. Í seinna førinum misti AGF málverjin bóltin, eftir at Zuma hevði roynt við skoti, og Peter Møller fekk úr tveimum metrum bóltin um mállinjuna.

Eftir dystin varð mest umrøtt, at tað endiliga í níggjundu royndini hevði eydnast Jörgen Pettersson at skora mál, og svenski álopsmaðurin hevði ikki orð fyri, hvussu glaður hann var fyri at spæla í superliguni. Svenski álopsmaðurin hevði tveir aðrar risamøguleikar at skora, men hann var ikki nóg neyvur, og hann ásannaði sjálvur, at tað hevði tikið longri tíð at koma á rætta lagið, enn hann hevði roknað við. Men nú segði hann seg rokna við, at tað fór at ganga væl. Og um hann hevur rætt, so verður kappingin hjá Toda Jónsson uppaftur størri.

# Vejle er væl við

**Eftir at teir mitt í vikuni komu víðari í steypakappingini, vunnu teir í Vejle týdningarmiklan útisigur sunnudagin ímóti Suðurjyllandi**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Í Vejle hevur tað leingi verið buldraligt fíggjarliga. Men á vøllinum hevur tað gingið væl síðstu dagarnar, og Christian Høgni Jacobsen hevur verið partur av liðnum, sum tað hevur gingið væl hjá.

Mitt í síðstu viku spældi Vejle í steypakappingini á útivølli ímóti FC Nordjylland. Heimaliðið gjørdi skjótt av og var á odda 2–0, áðrenn Vejle hevði fótað sær. Men so eydnaðist tað at javna til 2–2. Einki mál kom í longdu leiktíðini, og so var neyðugt við brotssparkskapping. Endaliga úrslitið var 7–6 til Vejle.

Christian Høgni Jacobsen varð skiftur inn í 69. minutti.

Sunnudagin var Vejle aftur á útivølli. Hesa ferð vóru teir í hinum endanum av Jyllandi, tí HFK Sønderjylland var mótstøðuliðið. Christian Høgni Jacobsen var allar 90 minuttirnar á vongverjanum í høgru, og tað fekk væl. Vejle vann 2–1, eftir at teir í steðginum høvdu verið frammanfyri 1–0. Fyrra málið fingu teir longu í 2. minutti og tað seinna fingu teir, tá ein hálvur tími var farin. 2. hálvleikur var tríggjar minuttir gamal, tá heimaliðið minkaði um munin.

Michael Blom skoraði fyrra málið, og hann hevði góðan møguleika beinanvegin aftaná at økja, eftir at Christian Høgni Jacobsen hevði spælt hann leysan. Seinna málið skoraði Lasse Lauth.

### Freja framvegis fremst

Randers Freja hevur tikið øll á bóli við at leggja seg á odda og við at megna at varðveita oddasessin. Hesa ferð vóru teir í Århus, har FC verður mett at vera torført mótstøðulið. Men krúnjydarnir vunnu 2–1.

Herfølge vann triðja sigurin upp í slag. Teir sendu B93 aftur til Keypmannahavnar við 1–0 tapi, og harvið er Herfølge framvegis næstfremst.

Ølstykke legði bragdliga fyri í summar, og Frem hevur verið roknað sum møguligt uppflytaraevni. Dysturin teirra millum í Valby endaði 3–3.

# Jákup fekk javnt

NOREG
*Jákup Mørk*

Føroyski landsliðsmálverjin vardi aftur málið, næst besta liðið hjá Molde spældi javnleik móti Strindheim

Í Noreg var friður í tippeliguni hetta vikuskiftið, men tað merkti so ikki, at Jákup Mikkelsen hevði frí.

Saman við hinum eykamonnunum hjá Molde var hann fríggjakvøldið í dysti í norsku 2. deildini, har teir á heimavølli hittu Strindberg.

Her gjørdist úrslitið javnleikur, 1-1, og tað man nú ikki vera so heilt galið hjá Molde, eftir at Strindheim seint í dystinum hevði lagt seg á odda.

Molde javnaði 10 minuttir fyri leiklok við máli, sum Andre Schei Lindbæk skoraði.

Komandi vikuskiftið verða aftur dystir í norsku tippeliguni, og er tað tá fjórð seinasta umfarið er á skránni.

Tá spælir Molde á útivølli móti Válerenga, sum er á sjeynda plássinum. Oddaliðið, Rosenborg hevur útidyst móti Bodø/-Glimt, og Lyn, sum er á øðrum plássi spælir úti ímóti Sogndal.



# Høvuðsstaðurin úr aftur skugganum

**FCK er nýtt oddalið í superliguni, har tað tykist vera sera torført at rokna úrslitini út. Tað sást eitt nú, tá báðir uppflytararnir komu úr Jyllandi og aftur í høvuðsstaðin við fullari úrtøku**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongur skjótt hvønn vegin í donsku superliguni. Fyri einari viku síðani vóru tað bara felag uttanfyri Keypmannahavn, sum vóru á fýra teimum ovastu plássunum. Eftir at níggjunda umfarið er spælt, eru tað við einum undantaki aftur feløgini í Keypmannahavn, sum eru á fremstu plássunum.

Óvanliga summarveðrið í Danmark var burtur sunnudagin, tá tað var rættuliga heystligt við vindi og regni.

Mest óvæntaðu úrslitini mundu vera, at tey bæði uppflytaraliðini úr útjaðaranum av Keypmannahavn komu aftur úr Jyllandi við fullari úrtøku.

Farum vann 3–1 í Aalborg. Mesta tosið um tann dystin snúði seg um málið, sum AaB skoraði heilt tíðliga, men sum hvørki dómarin ella linjuverjin sóu. Á sjónvarpsmyndunum var tað týðuligt, at bólturin hevði verið væl og virðiliga innanfyri málstrikuna.

Støðan er ikki ókend. Tað kann Ulrik Balling, sum nú er í NSÍ, skriva undir uppá. Í einum dysti fyri Vejle í vár, varð eitt mál hjá honum burturdømt akkurát upp á sama máta, sum tað var, tá Allan Gaarde úr AaB royndi við fløtum langskoti ímóti Farum málinum. Bólturin tók í ein lítlan jarnsteyra, sum var boygdur frá stólpanum og niður í jarnstongina, sum gongur aftur frá stólpanum. Dómarin mundi halda, at bólturin tók í stólpan og støkk aftur í spæl, men sjónvarpsmyndirnar vístu, at hann hevði verið innanfyri.

Tá málið hjá Ulrik Balling ikki vað góðkent í vár, varð varskógvað um trupulleikan við jarnstongini, og tá varð hon sagað burtur á onkrum vølli. Í gjár fóru teir til verka á øllum stadion, har teir ikki høvdu fingið trupulleikan av vegnum tíðliga í ár.

Støðan var 0–0, tá AaB var óheppið á heimavøllinum.

Í Viborg mundi heimaliðið ikki taka avbjóðingina í nóg stórum álvara ímóti Køge, sum ikki hevur staðið seg so væl higartil. Næstseinasta vikuskifti vunnu teir í Viborg 6–0 á Esbjerg, og so mundu teir ikki rokna við, at botnliðið fór at verða nakar trupulleiki.

Viborg legði seg á odda, men so fóru gestirnir at gera um seg. Teir takkaðu fyri, tá eftiransingarnar ikki vóru nóg nærlagdar, og heimaliðið fekk eina lektión í, at øll liðini í superliguni eru vandamikil, um tey ikki verða tikin í stórum álvara.

### UEFA árinið

Eftir 4–1 avhølvingina hóskvøldið í Bulgaria var væntandi, at teir í Brøndby fóru at verða moyrir. Men tað tóktist ikki bila, tí teir í FCM vóru uppaftur moyrari, eftir at teir hóskvøldið høvdu vunnið 1–0 á heimavølli ímóti kroatiskum mótstøðuliði í UEFA Cup.

Mesta tosið í sambandi við 4–0 heimasigurin hjá Brøndby snúði seg um Peter Foldgast, sum skoraði tvey mál, tá hann loysti Peter Madsen av. Hesin seinni lá í seingini, tí hann hevði ilt í búkinum.

Ókendi álopsmaðurin, Peter Foldgast, fekk í summar at vita frá Michael Laudrup, at hann ikki var nóg góður til a hópin, tí Laudrup helt hann ikki vera kropsliga nóg væl fyri. Tað varð ungi maðurin sjálvandi vónbrotin av. Men fyri tveimum vikum síðani varð hann fluttur upp í besta hópin, og sunnudagin takkaði hann so rudduliga fyri, tá hann fekk møguleikan.

OB stríddist hóskvøldið fyrimyndarliga í øllum regninum í Celta Vigo í Spania, har teir taptu 2–0 í UEFA Cup kappingini. Sunnudagin var OB í Esbjerg, og har sást klárt, at teir úr Odense ikki høvdu fingið møðina úr kroppinum og sinninum. Esbjereg smurdi teir av 5–0. Tað kann ikki sigast annað, enn at tað hevur gingið upp og niður hjá heimaliðnum. Eftir 3–0 sigurin á heimavølli ímóti FCK, tapti Esbjerg næstsíðst 6–0 í Viborg, og nú vunnu teir 5–0 á OB. Heimaliðið hevði møguleikar at vinna uppaftur størri sigur.

### Zidan avgjørdi

2–0 sigurin hjá FCK í Parkini var tann triði upp í slag, har heimaliðið bant fullkomuliga fyri í verjupartinum.

Einar tíggju minuttir burtur frá Parkini í bili varð eisini spælt í superliguni. Í Gladsaxe eru karmarnir ikki so pompøsir, sum teir eru í Parkini, og áhugin fyri heimadystunum hjá AB er ikki tann sami, sum hann er fyri teimum hjá FCK. Tað vóru millum seytjan og átjan túsund í Parkini, og tað vóru millum seytjan og átjan hundrað í Gladsaxe. Hesi fóru væl hýrd til hús, tí heimaliðið vann 1–0 á Silkeborg, sum nú er aftast.

Í donsku miðlunum verður gjørt burturúr, at tað var Zidan hjá AB, sum skoraði einasta málið. Hesin Zidan eitur Mohammed til fornavn. Hann er ættaður úr Egyptalandi, og hann hevði bara verið eitt hálvt minutt á vøllinum, tá hann í 2. hálvleiki skoraði einasta málið.



*Sigurin hjá FCK á AB var triði dysturin upp í slag, at FCK helt tætt í verjupartinum. Hetta hava teir annars ikki gjørt síðani apríl mánað*

## Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 9 | 5 - 2 - 2 | 14 | 13 | 1 | 17 |
| 2 | AaB | 9 | 5 - 1 - 3 | 13 | 12 | 1 | 16 |
| 3 | Farum | 9 | 5 - 0 - 4 | 14 | 14 | 0 | 15 |
| 4 | Brøndby (M) | 9 | 4 - 2 - 3 | 19 | 11 | 8 | 14 |
| 5 | Esbjerg | 9 | 4 - 2 - 3 | 22 | 20 | 2 | 14 |
| 6 | OB (S) | 9 | 4 - 1 - 4 | 16 | 15 | 1 | 13 |
| 7 | AGF | 9 | 3 - 3 - 3 | 13 | 14 | -1 | 12 |
| 8 | AB | 9 | 3 - 2 - 4 | 11 | 13 | -2 | 11 |
| 9 | FCM | 9 | 3 - 2 - 4 | 13 | 16 | -3 | 11 |
| 10 | Viborg | 9 | 2 - 4 - 3 | 17 | 18 | -1 | 10 |
| 11 | Køge | 9 | 3 - 1 - 5 | 16 | 19 | -3 | 10 |
| 12 | Silkeborg | 9 | 2 - 2 - 5 | 8 | 11 | -3 | 8 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Randers F. | 9 | 6 - 1 - 2 | 24 | 14 | 10 | 19 |
| 2 | Herfølge | 9 | 6 - 1 - 2 | 21 | 13 | 8 | 19 |
| 3 | Vejle | 9 | 5 - 2 - 2 | 14 | 9 | 5 | 17 |
| 4 | Ølstykke | 9 | 4 - 4 - 1 | 21 | 18 | 3 | 16 |
| 5 | Frem | 9 | 4 - 3 - 2 | 18 | 16 | 2 | 15 |
| 6 | HFK Sønderj. | 9 | 3 - 3 - 3 | 22 | 21 | 1 | 12 |
| 7 | Brønshøj | 9 | 3 - 3 - 3 | 11 | 10 | 1 | 12 |
| 8 | Fredericia | 9 | 3 - 3 - 3 | 11 | 12 | -1 | 12 |
| 9 | Skjold | 8 | 3 - 2 - 3 | 11 | 9 | 2 | 11 |
| 10 | B 1913 | 8 | 3 - 2 - 3 | 14 | 15 | -1 | 11 |
| 11 | B93 | 9 | 3 - 1 - 5 | 14 | 14 | 0 | 10 |
| 12 | FC Aarhus | 9 | 3 - 1 - 5 | 14 | 15 | -1 | 10 |
| 13 | AC Horsens | 9 | 2 - 3 - 4 | 13 | 17 | -4 | 9 |
| 14 | Hvidovre | 9 | 2 - 2 - 5 | 11 | 21 | -10 | 8 |
| 15 | B 1909 | 8 | 1 - 3 - 4 | 12 | 17 | -5 | 6 |
| 16 | HIK | 8 | 2 - 0 - 6 | 5 | 15 | -10 | 6 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Norska tippeligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg (M) | | 22 14- 4 - | 4 | 45 | 26 | 19 |
| 46 | | | | | | | |
| 2 | Lyn | 22 | 14 - 3 - 5 | 31 | 22 | 9 | 45 |
| 3 | Molde | 22 | 13 - 4 - 5 | 37 | 19 | 18 | 43 |
| 4 | Viking | 22 | 9 - 10 - 3 | 39 | 25 | 14 | 37 |
| 5 | Odd. Grenl. | 22 | 11 - 3 - 8 | 32 | 26 | 6 | 36 |
| 6 | Stabæk | 22 | 10 - 5 - 7 | 35 | 27 | 8 | 35 |
| 7 | Våleranga | 22 | 6 - 10 - 6 | 31 | 25 | 6 | 28 |
| 8 | Sogndal | 22 | 8 - 3 - 11 | 30 | 41 | -11 | 27 |
| 9 | Lillestrøm | 22 | 7 - 5 - 10 | 28 | 28 | 0 | 26 |
| 10 | Bodø/Glimt | 22 | 7 - 4 - 11 | 32 | 34 | -2 | 25 |
| 11 | Bryne | 22 | 7 - 4 - 11 | 33 | 36 | -3 | 25 |
| 12 | Brann | 22 | 7 - 3 - 12 | 29 | 41 | -12 | 24 |
| 13 | Moss | 22 | 5 - 5 - 12 | 23 | 38 | -15 | 20 |
| 14 | Start | 22 | 2 - 5 - 15 | 20 | 57 | -37 | 11 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)